Jóhan Eli Poulsen
løgtingsmaður

Nr. 26/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um sjóvinnubrøv, settur landsstýrismanninum í vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Føroyar hava atlimaskap í IMO. Hava Føroyar í tí sambandi tulkingarrætt til IMO-sáttmálar (konventiónir) – eitt nú STCW sáttmálan, eins og onnur lond hava?
2. Hava føroyskir útbúgvingar- og/ella sjóvinnumyndugleikar nakra bindandi avtalu við danska Sjóferðslustýrið (DMA), ið avmarkar ein møguligan føroyskan tulkingarrætt av STCW sáttmálanum?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at broyta kunngerðina um sjóvinnubrøv v.m. (Kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 við seinni broytingum) soleiðis, at siglingartíð við fiskiskipum yvir 500 BT eisini kann telja við sum vinnurættindi í handilsflotanum?
4. Vísandi til somu kunngerð. Ætlar landsstýrismaðurin at broyta útrokningina av siglingartíð soleiðis, at siglingartíðin hjá føroyskum sjómonnum frameftir verður upptald øðrvísi, t.d. at eitt ársverk á sjónum verður líkastillað við eitt ársverk á landi – eins og norðmenn gera?
5. Vísandi til somu kunngerð. Ætlar landsstýrismaðurin at gera tað møguligt, at yvirmenn á t.d. Strandferðsluni frameftir kunnu fáa siglingartíð, sum verandi á handilsskipi í altjóða sigling?
6. Vísandi til somu kunngerð. Ætlar landsstýrismaðurin at gera broytingar soleiðis, at føroyskir sjómenn, sum heild, ikki eru verri stillaðir (diskrimineraðir) enn eitt nú norðmenn.

Viðmerkingar:

Tað eru 18 ár síðan vit føroyingar yvirtóku málsøkið "trygd á sjónum" og fingu okkara egnu sjóvinnufyrisiting. Vit fingu eisini atlimaskap í IMO. Løgtingið hevur síðan samtykt at seta í verk (implementera) fleiri av sáttmálunum (konventiónunum) hjá IMO.

Ein av hesum sáttmálum er STCW (The International Convention on Standards of Training, Certification and Watchkeeping for Seafarers), sum umfatar útbúgvingarnar á maritima økinum, umframt vinnurættindi á sjónum (sjóvinnubrøv). Sáttmálin er gjørdur fyri handilsflotan, meðan fiskiflotin kemur undir STCW-F.

Í Føroyum hoyra sjálvar útbúgvingarnar undir Mentamálaráðið (Maritimu skúlarnar), meðan vinnurættindini hoyra undir Vinnumálaráðið (Sjóvinnustýrið, FMA). Í Danmark hoyra bæði útbúgving og vinnurættindi undir Erhvervs- og Vækstministeriet (Søfartsstyrelsen, DMA).

Tá Løgtingið hevur sett í gildi (ratifiserað) STCW sáttmálan, má takast sum givið at vit, eins og øll onnur lond, eisini hava tulkingarrætt.

Sjálvandi skal tulkast undir ábyrgd, soleiðis at tjóðar (nationala) lóggávan ikki gongur ímóti sáttmálanum.

Sum dømi upp á at londini tulka ymiskt, skal eg her við einum dømi vísa á, hvussu vit føroyingar tulka, og hvussu norðmenn tulka sáttmálan.

Noreg hevur eins og Føroyar ratifiserað bæði STCW og STCW-F sáttmálarnar. Norðmenn hava ein stóran fiskiflota og ein stóran handilsflota. Tí hava teir tulkað sáttmálarnar gagnliga til egnan fyrimun (pragmatiskt). Hóast STCW sáttmálin er ætlaður handilsflotanum, hava teir tulkað soleiðis, at siglingartíð við fiskifari oman fyri 500 BT "havgående skib" kann brúkast til at fáa vinnurættindi á handilsflotanum. STCW sáttmálin nevnir ongastaðni, at siglingartíð við fiskiskipi IKKI kann nýtast. Altso ein pragmatisk tulking til egnan fyrimun.

Tá tað snýr seg um longdina á siglingartíðini, hava teir eisini verið sera pragmatiskir. Útgangsstøðið hjá norðmonnum er at líkastilla eitt ársverk á sjónum við eitt ársverk á landi, sum í Noregi er 1867 tímar.

Tað merkir, at í staðin fyri at telja dagar, telja teir tímar og brúka so niðan fyri nevnda formil:

$$D=(x/1867)*365$$

D = dagatal verður funnið við at seta tímarnar (x) inn í formilin.

Roknað verður við, at arbeitt verður umborð í 12 tímar hvørt samdøgur, viðkomandi er mynstraður.

Ein 30 daga útmynstring telur sambært formlinum 71 dagar. Í Føroyum telur ein sama slag útmynstring 30 dagar.

Eisini hava norðmenn aðrar pragmatiskar tulkingar av STCW sáttmálanum. Eitt nú verður orðið "havgående" brúkt ístaðin fyri "altjóða", sum vit nýta í Føroyum.

Samanumtikið átti øll regluskipanin um vinnubrøv v.m. at blivið endurskoðað, soleiðis at vit ikki diskriminera okkara egna sjófólk, sum eru í kapping við t.d. norsk sjófólk.

Á Løgtingi, 27. november 2019

Jóhan Eli Poulsen